Erhard Joensen
løgtingsmaður

Nr. 36/2019

Svar uppá fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um dagpeningatíðarskeið, settur landsstýrismanninum í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

Spurningurin var soljóðandi:

Ætlar landsstýrismaðurin at broyta ásetingarnar í lógini um dagpening soleiðis at tíðarskeiðið, ið sjúklingar kunnu móttaka dagpening, í serligum førum (í sambandi við drúgva sjúkraviðgerð), kann leingjast út um núverandi 40 vikurnar?

Svar

At dagpeningur vegna sjúku kann veitast í mesta lagi í 9 mánaðir kann, sum Erhard Joensen, løgtingsmaður, vísir á, vera ein smeitur fyri løntakarar, sum blíva álvarsliga sjúkir. Umframt at hava sjúkuna at dragast við, kann fíggjarliga grundarlagið verða tikið undan familjuni. Og hetta kann aftur hava við sær aðrar sálarligar og sosialar avleiðingar fyri persónin og familju hansara.

Tað eru persónar við ávísum sjúkum og persónar, sum t.d. hava verið fyri ferðsluvanlukku, har viðgerðin er drúgv, men har tað er sannlíkt, at viðkomandi aftur kemur á arbeiðsmarknaðin. Tað er fatanin hjá landsstýriskvinnuni, at eitt framkomið vælferðarsamfelag eigur at tryggja, at hesi ikki detta niðurímillum.

Dagpeningur vegna sjúku er soleiðis skipaður, at ein persónur, sum verður sjúkur fær 100% av lønarmissinum, tó í mesta lagi 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya arbeiðsgevarafelag og Føroya arbeiðarafelag. Hægst møguliga útgjald er sostatt 4.232 kr. um vikuna, svarandi til góðar 18.300 kr. um mánaðin. Aftrat hesari upphædd skal leggjast frítíðarløn.

Eftir 9 mánaðum dettur rætturin til dagpening vegna sjúku burtur, og viðkomandi kann tá søkja um fyribilshjálp eftir forsorgarlógini. Upphæddin, sum verður veitt eftir forsorgarlógini, er treytað av aldri, uppihaldsskyldu o.ø., men upphæddin er altíð lægri enn hægsta útgjald eftir dagpeningalógini. Er talan um t.d. ein persón við børnum, sum er sambúgvandi (býr saman við øðrum vaksnum persóni), er uppihaldshjálpin uml. 12.800 kr., sum er 5.500 kr. lægri enn hægsta útgjald sambært dagpeningalógini.

Harumframt er ein treyt fyri yvirhøvur at móttaka uppihaldshjálp eftir forsorgarlógini, at viðkomandi ikki skal hava ognir av týdningi. Um viðkomandi t.d. hevur eina uppsparing, tá er høvuðsreglan, at uppsparingin skal brúkast fyrst. Og soleiðis sum forsorgarlógin er orðað í dag, verður atlit eisini tikið til møguliga ogn og inntøku hjá hjúnafelaga. Um hjúnafelagin t.d. hevur eina inntøku á 25.000 kr. um mánaðin, tá lækkar forsorgarhjálpin við uml. 6.000 kr.

Landsstýriskvinnan hevur longu umrøtt spurningin við umsitingina og ætlar í næstu tingsetu at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta lógina um dagpening vegna sjúku. Føroyska lógin um dagpening vegna sjúku og skipanir á arbeiðsmarknaðinum við løn undir sjúku, eru í nógvum tættum øðrvísi enn líknandi skipanir í londunum kring okkum, og tí verður ikki einans talan um at kopiera eina útlendska skipan. Tað ber tí ikki til at siga, á hvønn hátt lógin fer at verða broytt.

Spurningurin er tó ikki enn umrøddur í landsstýrinum ella í samgonguni, og fyrsta stig er at fáa politiska undirtøku fyri hesi týdningarmiklu sosialpolitisku raðfesting.

Tórshavn, 23. desember 2019

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur

landsstýriskvinna